Á kaffistovuni hjá SEV eta tey onga LJÓSA sjokolátu. Tey eta bara MYRKA sjokolátu!
**Maður, 42 ár**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

# Miðlamiarr




*Tey, sum kenna søguna aftanfyri Tórsvøll, vita, at hann er eitt úrslit av snævurskygdum lokaláhugamálum í Tórshavn.*
Klaksvíkingurin John William Joensen skrivar sína søgu. (Sosialurin)



Streymurin hevur verið í meir enn hálvt annað samdøgur út í eitt nú.
**Maður, 45 ár**

*Teir keypa sær eitt steyp. Teir halda fram at brúka pengar, til tað eydnast teimum at vinna okkurt.*
Sir Alex Ferguson, venjari hjá Manchester United, tosar um grannarnar í Manchester City. (The Sun)

Hví eru mandarinurnar so súrar í ár, eru tær kanska sunnari?
**Kvinna, 39 ár**



*Gentuskúlin gevur ikki dreingjum ein nøktandi skúladag og brynjar ikki gentur nóg væl til mansdomineraða samfelagið.*
Tóra við Keldu um føroyska fólkaskúlan.



Vit fara at minnast nullini sum tað sunna áratíggju, har vit valdu at liva leingi og sunt, heldur enn stutt og gott, og har vit øll runnu aftaná okkara egnu heilsu, uttan at vita hví. Vildi faktisk ynskt, at 10'ini blivu tað stuttliga áratíggju, har vit aftur fara at duga at liva, uttan bara at hugsa um ikki at doyggja.
**Maður, 45 ár**



*Eg gangi ikki so nógv upp í varðar. Uttan teir, sum tú gongur eftir.*
Robert McBirnie svarar spurningi um at seta varðar eftir seg í lívinum. (Dimma)

I am in a relationship with Facebook and It's Complicated!
**Kvinna, 24 ár**

*Hvør bók? Tað finnast so nógvar bøkur.*
Svenski Carl Gustav kongur svarar spurningi um, hvat hann heldur um bókina, har hann verður lagdur undir at liva ein playboy-lívsstíl. (Expressen)